gult cyan magenta svart



Melur allar tættir saman

BÓKMENTIR Innanskalla livir í skaldskapinum enn. Og ta› soyrir ikki bara, ta› logar enn. Væl er heilavillandi

Carl Johan Jensen

Ummæli:
Regin Dahl: Smámunir
Or› og løg, 2000

Mitt í øllum ólavsøkusveigginum, sjálvan ólavsøkuaftan — tann seinasta í øldini, sum skjótt lí›ur undir lok — kom naka› fyri, sum, tó eg ikki vil kalla ta› eitt undur, kortini er rárasta hending í hesum saltváta heimb‡li okkara. Á einari lítlari og yvirlætisleysari samkomu í einum listframs‡ningarhøli ni›ri vi› Frí›riksvág (t.e. í Vágsbotni) leg›i forlagi› Or› og løg fram eitt n‡tt verk eftir ein av var›unum í føroyskum bókmentum í tjúgundu øld. Hetta var eitt yrkingasavn. Smámunir eftir Regin Dahl. Sum oftani hjá Regini Dahl gevur tittulin líti› um seg, hann stendur mest sum ein lítillátin, ja hálvsmæ›in tilsiping á permuni til teir vindar av sjálvsiva sum aftur og aftur taka har›lig tøk í tann skapandi tilvitsstreymin, hvønn veg i› hann so rennur.

Eg skal beinanvegin vi›ganga, at ta› var vi› einum tvídrátti innast í sálini og ikki uttan honk, at eg tók mær hesa bók í hendur og fór at kaga í hana. Eg, sum eri øll hesi árini yngri og ikki fríur fyri ta blí›ernu tolsemi heldur, sum tann hálvungi mangan vil vísa tí eldra, ikki at siga aldra›a undangongumanninum. Eg hugsa›i, at eg fór at kenna meg onkursvegna sum Kristian á Brekkumørk á sinni, tá i› hann loysti kjaftbandi á berjaposanum hjá Hans Andriasi í Áarstovu. Eg hálvkvíddi fyri, at her fór eg at finna ymist í, sum væl kundi vera í skaldskapar nánd, men ikki var skaldskapur — í øllum førum ikki skaldskapur, i› stó› mát vi› ta›, sum Regin Dahl yrkti í bestu árum.

Men tak handa fanan, mátti eg ikki eta hetta aftur í meg.

Tí væl kann ta› vera, at ellisvomm og vi›urmø›i tyngja á skrokkin og boyggja knøini, at eyguni fara, hoyrnin vi› og tenn ringla í heysi, men innanskalla livir í skaldskapinum enn. Og ta› soyrir ikki bara, ta› logar enn. Væl og heilavillandi.

Skaldskapurin í n‡útgivnu bókini ber í mongum og mørgum dám av hesum, i› fær barokktónleik at taka seg út í huganum sum ein rennandi løk. Yrkingarlagi› er (eins og Regin Dahl sjálvur sigur um tónlistina hjá Bach í yrkingini Bach=svitur, Or›akumlar bls. 94-96) reint og fløkt, alt í semju, alt í sóma, men eisini í sama vi›fangi meldrar og afturundirger›ir. Yrkingarnar ey›kennast yvirhøvur av einum samanumtakandi klárleika, sum bæ›i er sárur, men eisini rúmar í sær unnileikans látur og ljós eitt nú hesi í yrkingini (bls. 43):

Dansistovan var stongd.
Úti hulislig nátt
og í veitum
burtur og hjá
hoyrdi tú
av og á
lítlan látur og andadrátt.
Men eingin sá.

Málsliga og yrkingarlagsliga breg›ur savni› ikki úr ætt. Tær málsligu røturnar liggja enn ni›ur í ta gomlu almúgumentanina, sagnirnar og kvæ›ini. Yrkingarlagi› er opi› og yvirhøvur leyst vi› myndbur› og anna› skaldsligt prunk og prál.

Evnisliga, man onkur lesari óiva› eisini halda, er ta› nógv ta› sama tógvi›, i› skaldi› hevur á snældduni her. Jú, gaman í er ta› ta›. Men hvat ger ta› sum so, um ta› eru somu tættirnar, i› ver›a maldir saman, um snældan ikki er runnin at enda enn? Er ta› ikki ta›, sum sermerkir skaldskap, i› nakar munur er í, at hann kann taka fáar træ›rir saman í eitt band, sum heldur. Í ein lesning.

Í Smámunum tekur Regin Dahl afturíaftur tey megin-temu, sum hava veri› uppstø›an í skaldsakapi hansara heilt aftur í hálvtr‡ssárini. Hann gevur í kast vi› somu tilvistarligu spurningar, sum eitt nú í Óttukvæ›um (1955), Gongubitum (1965) og Or›akumlum (1978). Her sæst aftur tann serkendi ansurin fyri tí varandi og ver›uga, i› tann kristna barnatrúgvin og Jesuspápin sum fyrr eru ímyndin av. Her er tann eirindaleysa sjálvskanningin, tann varliga metandi, sundurgreinandi og ósamtí›arliga mentanarsko›anin. Her er skemti. Gle›in. Hjartalagi› fyri lívinum, halgini og samskapninginum. Her er tann afturbeinda tí›in, sum fer› eftir fer› kemur so ólagaliga á nútí›ina vi› sínum avdúkandi og speiliga ljósi. Hvør minnist ikki yrkingar sum t.d. Kvæ›i fremsta framtakskappa landsins Her er ta› andstadda og mótsetta í allari veran. Her er ta› nærkunnuga og forgeingiliga tvinna› saman vi› hitt æviga, neyvt og minniliga, eitt nú í yrkingini Á sjúkrahústrappuni (á bls. 67).

Sum b‡urin l‡sir á hvørjari høvd.
Húsini skína
sum vóru tey gjørd
úr stjørnutilfari
og fólkini sum skuggar
millum
húsanna —
øll, hvør negl,
hvørt hár,
hjarta i› dukar,
bló›i›, i› rennur
rennur —
úr sama tilfari —
so, nú kemur bilurin
vi› glógvandi lyktum
eftir tí
sum er eftir av mær —
ja, vit eru øll gjørd úr
stjørnutilfari..

Her er ástin, holdsins lukka og lívsuggin í einum forbrendum og illum heimi (sí t.d. bls. 61):

Kossurin er
kostarligur,
kíning um
vangar og her›ar,
holdsins lukka —
at makast búk
á búki —
unduri› av øllum.
Vitska at fremja
lívi› —
men seinni at venda sær
hvørt
á sína li› í
song síni
heilsast
rumpa móti rumpu.

Her er ævikvøldi› vi› sínum hvokna lívføri og mannminkandi avmarkingum (sí t.d. bls.) :

Ill er ellin:
sper›il og spini
alt gongur fyri.

Ill er ellin:
lungu og livur
hjarta og n‡ru
avro›ini øll
alt gongur fyri.

Og sí›ani seinasta forra›i: dey›in, sum bæ›i er ósvitaligur endi og byrjan.

Eg nart omanfyir vi› samfelagsspei›i, i› javnt og samt vallar undan í skald-

Greinin heldur
fram á næstu sí›u

Limirnir í felagnum Føroyskir Listgrafikarar eru Marius Olsen, Astri Luihn, Aase Bømler Olsen, Jóna Rasmussen og Karstin Olgar Lamhauge

Føroyskir Listgrafikarar

T‡sdagin tóku fimm listafólk úr felagnum Føroysk Myndlistafólk seg saman og stovna›u eitt felag fyri listafólk, sum sjálv prenta egin listaverk. Heiti› á n‡stovna›a felagnum er Føroyskir Listgrafikarar.

Limirnir eru Astri Luihn, Marius Olsen, Karstin Olgar Lamhauge, Aase Bømler Olsen og Jóna Rasmussen, sum øll eru grafikarar.

Felagi› hjá Føroyskum Listgrafikarum hevur sum endamál at fremja áhugan fyri og vitanina um grafisku listina vi› m.a. at skapa karmar og skipa fyri frams‡ningum, skipa fyri fundum, fyrilestrum, rá›stevnum og tílikum fyri at l‡sa grafisku listina og umstø›ur hennara. Eisini er ætlanin at skipa fyri útgávu av minni ritum og størri bókaverkum um føroyskan grafikk og skipa fyri prenti og útgávu av grafiskum listaverkum

Mi›a› ver›ur móti at fáa egna pressu og egin høli at arbei›a í.

Longu nú er ein frams‡ning vi› teimum fimm á skránni undir Listastevnuni, sum Nor›urlandahúsi› skipar fyri í august næsta ár.

Føroysku grafikararnir hava veri› sera virknir seinasta ári›. Marius Olsen hevur havt frams‡ning í Smi›juni í Lítluvík í Havn, ta› sama hevur Karstin Olgar Lamhauge.

Í summar var› tann n‡ggja altartavlan, sum Karstin Olgar hevur skapt, vígd í Hattarvíkar Kirkju. Hetta er eitt stórsligi› verk, sum listama›urin hevur arbeitt vi› í fleiri ár.

Aase Bømler Olsen hevur konsentrera› seg um bókaútgávur, ikki færri en tvær bøkur hevur hon givi› út í ár. Tann eina, har hon sjálv stendur fyri hugskotum og grafiskari útforman, er úr rø›ini »Stuttlig tøl« sum Føroya Skúlabókagrunnur gevur út. Hin er úr rø›ini »Sk‡mingarløtan« frá Dansk Bogforlag. Hetta er trí›ja bókin, sum Aase Bømler Olsen myndpr‡›ir.

Astri Luihn hevur gjørt permumynd til bókina »Hvør av ø›rum«, hjá Maluni Marnarsdóttir. Astri Luihn hevur seinastu tí›ina arbeitt vi› tí stóru frams‡ningini í New York, har fimm føroysk myndlistafólk luttaka. Listaverkini eru send avsta›, og frams‡ningin letur upp á Manhattan 5. desember.

Jóna Rasmussen hevur veri› í›in at fáa grafiska verksta›in í listaskúlanum í gongd. Hon hevur saman vi› hinum grafikarunum veri› vi› á Várframs‡ningini og Ólavsøkuframs‡ningini.

Føroysku grafikararnir hava eisini víst list sína á Gallari Oyggin í Su›uroy.

framhald av sí›u 22

skapinum hjá Regini Dahl. Í hesum savninum er tann tátturin kanska upp aftur sjónskari enn á›ur og tónin eina øgn hvassari og minni umvegis t.d. í hesi yrkingini á bls. 37:

Og smádreingirnir!
Teir spæla vi›
teldum og
øllum loftsins
máttum —
ta› er eitt spæl,
ta› er einki fyri,
siga teir.
Ja, ta› er helst alt samalt
bara eitt spæl.

Summir av hesum samfelags- og mentanaratfinnandi tekstunum eru skornir burtur úr ørindum, sum nærum hvørt mansbarn á klettunum man kenna. Ørindum úr skjaldrum (sankta Mortan) og yrkingum eftir klassisk skald bæ›i føroyskum máli (t.d. áarstovubrø›urnar) og ø›rum málum vi› (t.d. Goethe). Ørindini ver›a snara›i solei›is, at ein spenningur skapast millum ta› upprunaliga innihaldi› og sjónarmi›i› hjá framsøgufólkinum í tí n‡ggja tekstinum. Hetta er ey›vita› eitt gamalt og kent stílbragd, men er brúkt vi› fynd og hegni her. Tak t.d. yrkingina Fø›ilands kvø›a (bls. 71), har or›ini í yrkingini hjá Janusi Djurhuus Føroyar, mítt land (nr. 6. í Føroyafólks) fimliga ver›a snara› á ranguna:

Føroyar, mítt land, o
oljuborg fría,
teg vil eg herja, í
rustdusti› stíga,
strí›ast sum hetjan, tá
bló›pengin gól —
girndtempul høga í
setandi sól.

Samanbori› vi› eldri søvn eftir Regin Dahl, hevur hetta n‡ggja savni›, haldi eg, i› hvussu er, okkurt av tí uppi vi› sær, sum gav tí lítla savninum Úr sjón og úr minni (1978) hjá Christiani Matras sítt serliga lag og dám. Í tí savninum eru øll megintemuni í skaldskapinum hjá Christiani Matras at finna, men framsett í einum einfalda›um, útímóti haikukendum or›alag. Eg veit eg sjálvandi at hetta eru ógvuliga ólíkar bøkur, hvat tá, men tær hava ta› í felag bá›ar, at høvundunum liggur á at taka saman um, at skava ta› óney›uga, ja smámunirnar so at siga, burtur og koma inn at tí, sum er kjarnin, sjálvt ali› í skaldskapi teirra.

Eg skal ikki siga, at hetta er besta savni›, Regin Dahl hevur lati› úr hondum um ævina, og ta› er so eisini ringt at døma um í øllum førum og ver›ur ongantí› anna› enn mín einstadda og sjálvklóka meting og líti› vi›komandi. Ta› sum um ræ›ur og fer at standa eftir tá i› av tornar er at hetta er skaldskapur, afturhaldsamur skaldskapur kanska og afturlítandi, jú, jú, men kortini skaldskapur, føroyskur skaldskapur, sum hevur gjørt okkum mun og eisini fer at gera okkum mun, me›an vit enn eru yvir moldum og hava vit til skilja skriva› ella mælt mál.